

*Umframt teir báðar føstu málverjarnar nógvu tey seinastu árini, Jákup Mikkelsen og Jens Martin Knudsen, hevur venjarin hesa ferð sent boð eftir Gunnari Nielsen*

fingu landsliðsboð, eru hesir: Jákup Mikkelsen, B36, Jens Martin Knudsen, NSÍ, Gunnar Nielsen, BK Frem, Óli Johannesen, TB, Jón Rói Jacobsen, BK Frem, Súni Olsen, GÍ, Mortan úr Hørg, VB, Atli Danielsen, KÍ, Johan B. Hansen, AC Horsens, Rógvi Jacobsen, KR, Fróði Benjaminsen, B36, Claus B. Jørgensen, Coventry, Jákup á Borg, HB, Julian Johnsson, B68, Ingi Højsted, B36, Tór-Ingar Akselsen, HB, Andrew av Fløtum, Fremad Amager, Jónhard Frederiksberg, Skála, Heðin á Lakjuni, KÍ, og Christian Høgni Jacobsen, NSÍ.

VB-GÍ:

# Sannleikans dystur hjá GÍ

**Verður talan ikki um stig á Eiðinum, kunnu næstu 17 umførini gerast sera strævin hjá GÍ. Og í veruleikanum er talan um sonevndan seksstiga dyst**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Hóast tað enn bert er farin ein triðingur av kappingarárinum, so líkist tað longu nú einum botngysara av format, tá GÍ sunnudagin vitjar í Vági.

Annars so sigursvanda GÍ hevur havt óvanliga vánalig úrslit higartil í ár, og hóast eitt ættarliðsskifti innibar niðurjusteraðar vónir til kappingarárið, so er verandi støðan ikki nakað, sum viðhaldsfólkini uttan víðari vilja góðtaka. Fýra stig frá níggju dystum hava sent liðið á ein botnsess, har teir í løtuni eru fýra stig aftan fyri VB, sum eru næstniðastir.

Og tí verður talan um ein sokallaðan seks-stiga dyst hesaferð. Vinnur GÍ, so er níggjunda plássið bert eitt stig burturi, meðan eitt tap hinvegin ber við sær, at frástøðan uppeftir talvuni gerst væl størri, enn gott er.

## Skulu vísa karakter

Og hetta tykjast spælararnir eisini vera fullgreiðir um. Og teir fara suður til vágs við sera greiðum setningi.

- Hesin dysturin má so fyri alt í verðini ikki tapast. Og ongantíð betri, enn um vit fáa trý stig burturúr, sigur Sámal Joensen.

Sjálvur hevur Sámal annars verið á skaðalistanum seinastu vikurnar, men hann roknar tó við at verða tøkur sunnudagin, eins og Jónreid Dalheim helst eisini verður tað, eftir at hann hevur verið úti við skaða.

Sámal viðgongur, at vánaligu úrslitini sjálvandi hava merkt lagið í hópinum nakað seinastu tíðina, men hinvegin vil hann á ongan hátt geva skarvin yvir.

- Vit ætla okkum so ikki at fara niður við høvdinum. Tvørturímóti er tað júst í hesum dystinum, at vit skulu vísa karakter, staðfestir Sámal.



*Hóast tað enn eru 18 dystir eftir at spæla, so líkist tað longu nú einum sonnum botn-gysara, tá GÍ vitjar í Vági*

## Heimaavrikini betrast

Men einki er at ivast í, at eisini vágbingar vilja hava stig burturúr dystinum. Júst GÍ er eitt av liðunum, sum VB hevur staðið seg merkisvert illa ímóti á heimavølli.

- Yvir høvur hava avrikini hjá okkum als ikki verið nóg góð á heimavølli í ár. Og tað er nakað, sum má betrast nú. Tí hesin dysturin skal geva seks stig.

Tað er nýklækti landsliðsspælarin hjá VB, Mortan úr Hørg, sum vit hava í horninum.

Eins og Sámal Joensen, so ásannar Mortan, at hetta er ein ordiligur botngysari, hóast kappingarárið enn er tungt, og at dysturin fyri alt í verðini ikki má tapast.

Og eins og GÍ, so hava vágbingar allar mans tøkar til dystin. So er spurningurin, hvørt nakrar broytingar verða framdar í mun til samansetingina, sum fyri viku síðani misti sigurin á EB/Streymi í evstu løtu.

## Dystir um vikuskiftið

formuladeildin

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 22.05 | B36-Skála | Petur Reinert |
| 22.05 | VB-GÍ | Eiler Rasmussen |
| 22.05 | ÍF-EB/S | Páll Augustinussen |
| 22.05 | KÍ-TB | Birgir Sondum |
| 23.05 | HB-NSÍ | Georg Rasmussen |

**2. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 21.05 | B36-LÍF | Dan Højgaard |
| 21.05 | Royn-AB | Jens Petur Brattalíð |
| 21.05 | B71-HB | Rúni Gaardbo |
| 21.05 | FSV04-GÍ | Regin Egholm |
| 21.05 | B68-Sumba | Petur Skarðenni |

**3. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 22.05 | B68-EB/S | Eugen Voda |
| 22.05 | SÍ-Fram | Sune Johansen |
| 22.05 | HB-NSÍ | Andrew Christiansen |
| 22.05 | KÍ-VB | Jan Gardar |
| 22.05 | ÍF-Skála | Jónsigurd Gleðisheygg |

**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 22.05 | AB-B36 | Ørvur á Lag |
| 22.05 | FSV04-GÍ | Kristin av Kák |
| 22.05 | KÍ-EB/S | Bogi Joensen |

B36-Skála:

# B36 bíðar eftir innferðarloyvi

**Í árstalsfelagnum siga tey seg hava allar mans tøkar, men tey eru nú um at ótolnast eftir innlendismálaráðnum, sum ikki vil umseta neyðugu pappírini**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*

Hóast tað nú er liðið hálvt annað ár síðani, at rumblið um útlendingar – ikki minst útlendsk ítróttarfólk – av álvara byrjaði, so eru framvegis snøklar eftir í hesum.

Hetta er nakað, sum tey í B36 kunnu skrivað undir uppá, tí hóast tey síðani kappingarbyrjan hava havt brasilianska Wellington við í venjingum, so hevur álopsleikarin enn ikki spælt ein tann einasta minutt fyri B36. Orsøkin er stríðið um umseting av pappírum í samband við innferðarloyvi, so hóast føroysku myndugleikarnir langt síðani hava sent sítt viðmæli víðari, so bíðar Wellington framvegis eftir endaliga stemplinum.

Í aðrar mátar siga tey í B36 seg hava allar mans tøkar. Pól Thorsteinsson var ikki við seinast, men tað verður roknað fyri víst, at hann nú aftur er tøkur, og tað sama verður sagt um Inga Højsted, sum teir báðar seinastu dystirnar er skiftur út vegna smávegis trupulleikar.

Hjá Skála er største ivamálið miðvallarmotorurin, Pauli G. Hansen. Hann hevur fingið ein skaða í lærkrikanum, og hevur at kalla als ikki vant í vikuni. Vónin er sjálvandi, at hann verður tøkur til týdningarmikla útidystin, men tá vit hóskvøldið høvdu samband inn á Skála, vóru vónirnar avgjørt ikki av teimum bestu.



*Fyri bara hálvari aðru viku síðani spældu B36 og Skála javnleik á Skála*